UTTAN ÚR HEIMI

# USA skelkað av hálshøgging

## Leita eftir leivdum

Síðani týsdagin hava ísraelskir hermenn verið í Gaza-geiranum og leitað eftir leivdunum av seks ísraelskum hermonnum, sum doyðu í einum samanbresti við palestinar fyrr um dagin.

Ísraelski herovastin, Moshe Yaalon, segði í gjár, at hermenninir fara at halda fram við leitingini, til tað seinasta av teimum seks hermonnunum er funnið. Hann segði, at herurin fer at nýta ta megi, sum er neyðug fyri at fáa fatur á tí, sum leitað verður eftir.

Ísrael roynir altíð at fáa fatur á hermonnum, sum doyggja í samanbrestum við palestinar, og herfyri vórðu fleiri hundrað palestinskir fangar latnir leysir í býti við leivdirnar av nøkrum hermonnum. Palestinararnir, sum skutu teir seks hermenninar týsdagin, ætla eftir øllum at døma at fáa tað sama burtur úr hesaferð. Teir hava kunngjørt, at vilja ísraelsmenn hava leivdirnar, mugu teir lata okkurt afturfyri.

## Ímóti samanlegging

Bara 36 prosent av teimum donsku veljarunum taka undir við uppskotinum hjá stjórnini um at taka amtini av og at leggja fleiri kommunur saman. 43 prosent eru ímóti uppskotinum, og 20 prosent vita ikki, hvat tey skulu siga um tað.

Hetta kemur fram í einari kanning, sum stovnurin Rambøll hevur gjørt. Kanningin vísir, at tað eru serliga kvinnurnar, sum eru ímóti uppskotinum. 45 prosent siga nei til at taka amtini av og at leggja kommunur saman, og 33 prosent taka undir við tí. Hjá monnunum er støðan beint tann øvugta. 46 prosent av monnunum eru samdir við stjórnini, og 39 prosent eru ósamdir við henni.

Sambært kanningini eru tað serliga fólk á Fyn, sum eru ímóti stjórnaruppskotinum, men tað kemst helst av, at eftir uppskotinum skulu Fyn og syðri partur av Jyllandi leggjast saman í eina eind.

## Verða verandi í Irak

Teir umleið 500 donsku hermenninir, sum eru í Irak, verða verandi har seks mánaðir afturat.

Tað er greitt, eftir at meirilutin í Fólkatinginum hevur tikið undir við at leingja heimildina hjá hermonnunum. Bæði Sosialdemokratarnir, Radikala Vinstra, Danski Fólkaflokkurin og Kristiligu Demokratarnir taka undir við stjórnini.

Radikala Vinstra hevur alla tíðina verið ímóti, at Danmark hevur hermenn í Irak, men fyrrverandi uttanríkisráðharrin Niels Helveg Petersen sigur tað vera umráðandi, at altjóða hermenn eru í landinum, tá irakar taka við valdinum. Hann sigur seg eisini vænta, at ST fær ein størri leiklut í Irak í framtíðini.

## Skrivað bók um Saddam

Norski útvarpsmaðurin Lars Sigurd Sunnanå hevur skrivað eina bók um fyrrverandi irakska leiðaran Saddam Hussein.

Aftenposten skrivar, at høvundurin fer eftir øllum at døma at fáa nógvar pengar burtur úr bókini, sum er hansara fyrsta. Forlagið Cappelen hevur prentað 5.000 eintøk til sølu í Noregi, men roknað verður við, at bókin má endurprentast rættiliga skjótt. Harafturat hava forløg í 14 londum keypt rættindini til at geva bókina út har.

Lars Sigurd Sunnanaa hevur skrivað bókina við hjálp frá Ala Bashir, sum var lækni hjá Saddam Hussein, og sambært Aftenposten skulu teir báðir býta inntøkuna av bókini sínamillum. Men nóg mikið verður í part, tí sambært blaðnum er tað als ikki óhugsandi, at teir fara at fáa fleiri milliónir krónur í part burtur úr bókini um Saddam. Sjálvur sigur útvarpsmaðurin seg ikki hava gjørt sær nakrar metingar um inntøkuna, men hann ásannar, at bókin kann fara at kasta væl av sær.

**Myndirnar, sum vísa yvirgangsmenn hálshøggja amerikanaran Nick Berg, hava skelkað USA. Harðskapurin ímóti teimum iraksku fangunum er einki samanborið við hatta, siga fleiri politikarar**

IRAK-KRÍGGIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Nick Berg bleiv avrættaður sum hevnd fyri amerikonsku framferðina ímóti irakskum fangum*
*Mynd: Reuters*

– Guð er stórur! Guð er stórur! rópa menninir á sjónbandinum. Á gólvinum frammanfyri situr amerikanarin Nick Berg bakbundin.

– Vit siga tykkum, at æran hjá teimum muslimsku monnunum og kvinnunum í Abu Ghraib-fongslinum kann bara bjargast við blóði og sálum. Frá okkum fáa tit ikki annað enn kistur og aftur kistur við monnum, sum eru viðfarnir sum hesin. Tit hava háðað Islam og muslimskar menn og kvinnur, og George Bush fer at iðra seg um tann dag, hann setti fótin á irakska jørð, sigur ein av yvirgangsmonnunum.

Síðani verður Nick Berg tikin til viks og hálshøgdur. Aftaná halda yvirgangsmenninir høvdinum upp fyri upptøkutólið.

Menninir, sum hálshøgdu Nick Berg, eru limir í felagsskapinum Ansal-al-Islam, ið hevur tætt tilknýti til al-Qaeda. Leiðari í felagsskapinum er Abu Musab al-Zarqawi, sum sambært amerikonsku fregnartænastuni var bindilið ímillum al-Qaeda og Saddam Hussein. Sambært sjónbandsupptøkuni var tað Zarqawi sjálvur, sum tók lívið av Nick Berg.

### Einki afturímóti

Í USA eru fólk skelkað av sjónbandsupptøkuni úr Irak, og fleiri republikanskir politikarar siga, at núna stani síggja amerikanarar, hvat tað eru fyri kreftir, sum teir hava við at gera í Irak. Tað, sum hendi teimum iraksku fangunum, var einki aftur ímóti hesum, siga teir.

– Nú bíði eg bara eftir, at teir arabisku leiðararnir fara at biðja um umbering og at fordøma brotsgerðina at myrða ein sivilan amerikanara. Hatta eru ikki hermenn. Hatta eru ódjór og yvirgangsmenn, og vit fara ikki at helma í, fyrr enn teir enda í fongsli ella á kirkjugarðinum, segði Tom DeLay, sum er republikanskur limur í Umboðsmannatinginum.

Foreldrini hjá Nick Berg hava greitt frá, at sonurin var farin til Irak at leita sær arbeiði. Tey halda, at amerikonsku myndugleikarnir gjørdu ov lítið fyri at finna hann á lívi.

# Legði forsetan undir at vera fullan

Forsetin í Brasil, Luiz Inacio da Silva, umhugsar at stevna blaðnum New York Times, sum vildi vera við, at forsetin hevur rúsdrekkatrupulleikar.

Í einari grein herfyri umrøddi New York Times eina vitjan hjá brasilska forsetanum á einari ølstevnu, og blaðmaðurin gjørdi greitt, at eftir hansara tykki hevði forsetin drukkið so nógv, at hann var sjónliga ávirkaður.

Orðini hava fingið øði í brasilskar politikarar. Talsmaðurin hjá forsetanum sigur við BBC, at sendiharrin í Washington hevur fingið boð um at taka málið upp, og at hann skal tosa við blaðstjóran á New York Times.

Málið er eisini komið í brasilska tjóðartingið. Har halda fleiri, at amerikanska blaðið hevur háðað Brasil. Tað er ikki brasilski forsetin, men tann amerikanski uttanríkispolitikkurin, sum er fullur, siga teir brasilsku tingmenninir.



Vígdis Finnbogadóttir:

# Kensluborið grenj fremur onga javnstøðu



*Vígdis Finnbogadóttir bergtók fullsetta salin í Norðurlandahúsinum á Javnstøðuráðstevnuni*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hon er ikki vorðin minni hvassorðað við árunum. Vígdis Finnbogadótiir, heimsins fyrsti kvinnulig forseti og ímyndin av, at alt ber til, bergtók fullsetta salin í Norðurlandahúsinum á Javnstøðuráðstevnuni**

RÁÐSTEVNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hon gjørdist heimsins fyrsti kvinnuligi forseti og varð sitandi í 16 ár. Slíkt setur spor - bæði politiskt og ikki minst í hugaheiminum hjá fólki. Vígdis Finnbogadóttir útstrálaði, sum ongin annar, eitt gløggskygni og ein frið, sum gjørdi tað óviðkomandi at spyrja, hvussu tað kendist at vera kvinna í forsetaembætinum. Eitt av hennara eyðkennum var, at hon ongantíð helt seg aftur við at siga tað hon meinti og ongan iva lat vera um at hon meinti tað. Og tað ger hon framvegis, nú hon er farin um tey 70.

### Bróst og bein í staðin fyri vit og skil.

Ísland er, uppá so nógvar mátar, ein fyrimynd fyri javnstøðuarbeiði um allan heim. Men trøini vaksa ikki inn í himmalin, og Vígdis fýrdi ikki fyri at lata kvinnurnar í salinum í Norðurlandahúsinum vita, at størsta afturstigið á leiðini til javnstøðu í nýggjari tíð, høvdu tær sjálvar skyldina av.

– Tað gekk so væl við javnstøðuarbeiðinum líka til mitt í 90 unum. Tá tóktist tað knappliga, sum at ein ósjónlig hond legði seg niðuryvir framburðin og segði, at nú kundi tað vera nokk. Orsøkin var, at kvinnur vóru farnar at lata seg í sum sexobjektir, og øll onnur harvið hildu uppat at taka tær í álvara, segði Vígdis.

– Hálvnaknar fotomodellir gjørdist fyrimyndir, og kvinnur fóru at vísa bróst og bein í staðin fyri vit og skil. Sjálvt smágentur hava funnið út av, at jú minni klæði tær hava á kroppinum, jú meir uppmerksemi fáa tær. Og hetta eru tær, sum skulu føra javnstøðuarbeiðið víðari. Men hvør fer at taka eitt sexobjekt í álvara við samráðingarborðið? Ikki eg, segði Vígdis avgjørd á málinum.

### Plantað eitt træ

Sum forseti, gjørdist Vígdis millum so nógv annað kend fyri at planta trø, har hon kom á vitjan. Við trøunum vildi hon seta spor og minna á, at hugburðsbroytingar vaksa spakuliga, men tær vaksa. Eisini tá vit eru sannførd um, at ongin gróðrarbotnur er.

– Eg plagdi at hava trø við mær, tá eg vitjaði úti á vesturstrondini í Íslandi. Hetta flentu fólk sjálvandi at, tí øll vistu, at onki kundi vaksa á har. Øll uttan forsetin. Berliga lendið prógvaði jú, hvussu eiðasør jørðin var har um leiðir, varð sagt. Men eg plantaði trøðini kortini og tað riggaði. Onnur hildu fram við arbeiðinum, og nú vaksa heilir skógir á vesturlandinum.

Soleiðis kanst tú broyta sjávt tær mest óvikaligu sannføringarnr hjá fólki.

– Eg minnist eisini, at tá fólk seinni frættu, at eg fór at koma á vitjan, ringdu tey frá staðnum og spurdu, um eg sjálv hevði trø við, ella um tey skuldu skaffa mær tey. Og nú havi eg hoyrt, at Altingið er farið at veita fíggjarligan stuðul til skógarplanting á vesturlandinum, flenti Vígdis.

### Út við grenjinum!

Hugburðsbroyting er eisni gandaorðið í javnstøðuarbeiði, men Vígdis minti á, at slíkt sjáldan hendir av sær sjálvum.

– Kvinnur mugu sjálvar taka stig til at prógva, at dugur er í teimum. Og sum eitt tað fyrsta, skulu vit halda uppat við okkara kenslubornu ákærum og møðsama grenji. Í staðin skulu vit skapa intellektuel vinarbond við mannfólkini og soleiðis eisini skapa virðing rundanum okkum.

– Sum forseti var eg ongatíð í iva um, at fólk, eisini mannfólk, lurtaðu eftir mær. Ikki tí, at eg var forseti. Ikki tí, at eg var kvinna. Men tí at eg hevði nakað uppá hjarta, eina meining, sum eg vildi, at onnur skuldu hoyra, segði Vígdis Finnbogadóttir.

# Kalt í erva



*- Jansy Olsen, limur í javnstøðunevndini, handaði Edmundi Joensen, løgtingsformanni, málning av Maritu Petersen. Listamaðurin Eivindur Mohr hevur málað málingin*

**At tað kann vera ógvuliga kalt í erva eiga øll, sum ætla sær uppí politikk, at gera sær greitt. Eisini kvinnur, segði Jóannes Eidesgaard millum annað, tá hann setti Javnstøðuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum**

RÁÐSTEVNA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Hóast Jóannes Eidesgaard mátti viðganga, at enn er langt eftir á mál á leiðini móti javnstøðu í Føroyum, so helt hann nógv vera hent, síðani javnstøðulógin kom í gildi í 1994.

– Støðan í dag er ein heilt onnur, enn hon var fyri 10 árum síðani. Sum heild eru fólk munandi meir tilvitað um týdningin av javnstøðu. Javnstøðuspurningurin er sjónligari, og hann er ovarlagari á dagsskránni, enn hann nakrantíð áður hevur verið.

Og mest av øllum: Óloysta málið gevur okkum mannfólki ringa samvitsku, so her er ein vón, helt løgmaður.

### Øll hava ábyrgdina

Jóannes Eidesgaard royndi ikki at smoyggja sær undan eyma spurningin um vánaliga kvinnuligu umboðanina í føroyskum politikki.

– Vit politikarar og floksformenn eiga okkara part av ábyrgdini av, at tað er so soltið við kvinnum, har tær politisku avgerðirnar verða tiknar. Vit mugu royna at finna ein framferðarhátt, so at konufólk ikki bera seg undan at stilla upp. Og vit mugu eisini koma burtur frá freistingini, at fáa konufólk á listan beint upp undir val, bara fyri at snøgga um floksmyndina úteftir. Byrja vit ikki alt fyri at at virka fyri, at kvinnur fáa somu sømdir at føra valstríð og at virka í politikki, sum menn, er alt til fánýtis.

– Men tað er ikki bara sum at siga tað, at stíga fram, smoyggja anonymitetin av sær og taka avgerðir sum røkka langt, og sum fella mongum fyri brósti. At tað kann vera ógvuliga kalt í erva í politikki er ikki bara eitt inntómt orðafelli. Tað eiga øll, sum fara uppí politikk, at gera sær greitt. Og kvinnur skulu ikki vænta, at tað verður øðrvísi fyri tær. Tí mugu kvinnur eisini sjálvar spenna seg út, tí vit hava ikki ráð til at vera helvtina av fólkinum og tilfonginum fyri uttan.

– Nú má tann stundin vera komin, at vit taka stig til ítøkilig tiltøk, sum kunnu gera javnstøðuna til veruleika. Dagurin í dag skal geva okkum íblástur til framtíðar arbeiðið við javnstøðu. Við hesum orðum setti løgmaður ráðstevnuna.

### Mintust Maritu

Løgmaður nýtti eisini høvið at minnast Maritu Petersen, sálu.

– Við at minnast Maritu, minnast við eisini kvinnuna, flokksformannin, løgtingsformannin og løgmannin, sum gjørdi allar fordómar um tað undirumboðaða kynið í føroyskum politikki til skammar, segði Jóannes Eidesgaard.

Síðani handaði Jansy Olsen frá Javnstøðunevndini Edmundi Joensen løgtingsformanni ein málning av Maritu Persen, og Vilhelm Jóhannesen helt eina sera hugtakandi minningarrøðu um sín gamla floksfelaga.